Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Árni Skaale, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í Fiskivinnu- og samferðslumálum.

Evni: Hvussu royndist Føroyabanki í 2022

Spurningar:

1. Hvussu royndist skipanin, tá hugsað verður um fleksibilitet og gagnnýtslu av samlaða talinum av tillutaðum døgum í teimum trimum bólkunum sum fingu loyvi at veiða á Føroyabanka?
2. Hvørjir bátar, greina á bólkar, veiddu á Føroya Banka í 2022?
3. Hvussu stórt varð veiðivirðið hjá hvørjum einstøkum bólki sær?
4. Hvussu er miðalvirðið pr. veiðudag hjá hvørjum bólki sær?

Viðmerkingar:
Eftir, at tað bleiv staðfest, at toskurin á Føroyabanka var minkaður sera nógv, varð hesin stongdur fyri allari veiðu í 2008.
Smávegis royndir hava ígjøgnum árini verið gjørdar, men ikki fyrr enn í 2022 bleiv fiskiskapur aftur skipaður á vinnuligum grundarlagi. Tó varð hetta gjørt við eini serskipan fyri bara eitt ár. Sostætt skal nýggj skipan gerast fyri 2023.
Fyri at lýsa málið so væl sum gjørligt, áðrenn støða verður tikin til skipan fyri 2023, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 20. januar 2023

Árni Skaale